## Søkt verður eftir avloysara til sambýli Eysturstræti 4

Søkt verður eftir avloysara fyri starvsfólk í barnsburðafarloyvi frá **01.02. 11 til 01.09.11**
Sambýli Eysturstræti 4 er viðgerðarstovnur fyri yngri við sálarsjúku.

**Førleikakrøv**
Tann, ið settur verður, skal hava heilsu-sosialfakliga ella aðra viðkomandi útbúgving.

Talan er um fulltíðarstarv. Arbeitt verður allar gerðandisdagar frá kl. 8.00 til 16.00

Stovnurin arbeiðir eftir miljøterapeutiskum meginreglum. Sum starvsfólk skal tú átaka tær ymiskar uppgávur, tí er umráðandi, at tú ert álítandi, jaligur, hevur góð samstarvsevnir, ert ágrýtin og dugir at arbeiða sjálvstøðugt. Eisini verður stórur dentur lagdur á, at umsøkjarin er nærlagdur og dugir at seta seg inn í, og virða støðuna hjá tí einstaka.

Lønar- og setanartreytir sambært avvarandi yrkisfelag.

**Umsøkn** við prógvum skal verða stovninum í hendi í seinasta lagi tann 05.01.11

**Nærri fæst at vita** um starvið, við at venda sær til:
Sámal Lindenskov.
deildarleiðara Tlf. 219152 ella
sameys@post.olivant.fo

**Sambýli Eysturstræti 4**
*Att: Sámal Linenskov*
Fo-100 Tórshavn.
Tlf 219152

# TIL SØLU

Niðanfyri nevndu bilar, sum báðir hava motorbrek, eru til sølu:

**Slag:** **HUNDAY GALOPPER 2,5**
**Árgang:** **2000**
Upplýsingar um bilin fáast frá vatnmeistaranum á tlf. 21 45 06.

**Slag:** **VW Transporter 2,5 TDI**
**Árgang:** **1997**
Upplýsingar um bilin fáast frá arbeiðsformanninum á tlf. 22 35 90.

Skrivlig boð skulu verða kommunuskrivstovuni í hendi í seinasta lagi mánadagin 20. december 2010.

RUNAVÍKAR KOMMUNA

Heiðavegur 26 · Box 139 · 600 Saltangará

www.sosialurin.fo

RUNAVÍKAR KOMMUNA

søkir eftir

## Starvsfólkum til Barnagarðin á Mýrunum

**Søkt verður eftir:**
Varðaleiðara 35t um vikuna (hetta er eitt farloyvisstarv frá 1. jan til 31. des. 2011) Arbeitt verður 28t inni á eini barnagarðsstovu og 7t inni á kontórinum.

**Førleikakrøv:**
vit sóknast eftir starvsfólki, ið eru nýhugsandi og ígongdsetandi og eru opin, jalig, duga at veita umsorgan og hava góð samstarvsevnir. Vit ynskja, at tú, í tøttum samstarvi við starvsfelagar og foreldur, kann skapa ein fjølbroyttan, mennandi og tryggan dag fyri hvørt einstakt barn.

**Vit bjóða tær:**
eitt spennandi starv við nógvum fjølbroyttum avbjóðingum í dagligdegnum, har tú blívur ein partur av okkara breiða starvsfólkahópi, har tað námsfrøðiliga arbeiðið verður raðfest høgt. Dentur verður lagdur á, at møguleiki er fyri fakligari og persónligari menning.

**Eisini verður søkt eftir:**
Starvsfólki 25t um vikuna, til at taka sær av vasking av klæðum, kaffistovuni, bílegging av vørum og at gera ein góðan og sunnan millummála til øll børnini hvønn dag.

Størvini verður sett, frá 1. jan. 2011 ella eftir nærri avtalu. Pedagogar, sum verða lidnir í februar eru vælkomnir at søkja. Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Nærri fæst at vita um starvið við at tosa við Jastrid Weihe, leiðara á tlf. 448254 ella 218254.

Umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum skal vera kommununi í hendi í seinasta lagi mánadagin 20. des. 2010, kl. 12.00.

**Runavíkar Kommuna**
Heiðavegur 26 · Postrúm 139
FO-610 Saltangará

Umstøðurnar á stovninum eru sera góðar við ljósum rúmligum stovum við eyka spælirúmi. Harumframt er verkstaður, sansirúm, samtalu/venjingarrúm og stórt felags/rørslurúm við barnavinarligum køki. Stovnurin liggur í vøkrum náttúrulendi beint við Toftavatn og nær við ítróttarøkið.


# Nýggjar TANNPROTESUR

**Broytingar og umvælingar av gomlum protesum**

Kliniskur tannteknikari

Bergur á Reynatrøð

Opið er: mánadag-hósdag frá kl. 9-16 fríggjadag frá kl. 9-12

Børkuvegur 620 Runavík Tlf. 448480



# Jólamatur

Nakrar gæs og nøkur krov til sølu

Áhugað kunnu ringja til Júst Rubeksen á tel. 315129 / 215125




FØROYA LANDSBÓKASAVN

## BÓKAVØRÐUR TIL LANDSBÓKASAVNIÐ

**Fyri bókavørð, ið fer í barnsburðarfarloyvi, verður søkt eftir avloysara fulla tíð til 1. august 2011. Starvið verður sett 12. januar 2011 ella skjótast tilber.**

Arbeiðsuppgávurnar eru skráseting, vaktir í útláninum og annað bókavarðaarbeiði.

Umsøkjari skal hava bókavarðaútbúgving. Fyrimunur er at hava royndir við bókasavnsarbeiði. Umsøkjari skal hava góð samstarvsevni, vera ágrýtin, tænastuhugaður og vera til reiðar at royna nýggjar avbjóðingar.

Vit kunnu bjóða eitt avbjóðandi starv í einum fakliga spennandi og broytiligum umhvørvi. Starvið er merkt av nógvum samskifti úteftir og tøttum samstarvi við starvsfelagarnar.

Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Armgarð Weihe, virkandi landsbókavørð, á 356520 ella á armgardw@flb.fo.

Umsókn við avriti av prógvum og C.V. skal vera Føroya landsbókasavni í hendi **í seinasta lagi 22. desember 2010**.
Umsóknin skal sendast til:
**Føroya landsbókasavn**
Stílað Armgarð Weihe
J.C. Svabosgøta 16
Postboks 61
110 Tórshavn

Føroya landsbókasavn er skipað undir Søvnum Landsins, sum verður sett á stovn 1. januar 2011. Søvn Landsins er ein yvirskipað fyrisiting av søvnunum undir Mentamálaráðnum: Føroya Landsbókasavn, Føroya Landsskjalasavn, Føroya Fornminnissavn, Føroya Náttúrugripasavn og Havlívfrøðiliga Royndarstøðin. Virkisøkið fevnir um náttúru- og mentanarsavnsvirksemi, skjalasavnsvirksemi og bókasavnsvirksemi. Umleið 70 fólk starvast á søvnunum, sum í løtuni húsast á tólv ymiskum støðum.

Landsbókasavnið er tjóðbókasavn føroyinga og hevur sum høvuðsuppgávu at savna inn, skráseta, varðveita og fremja útbreiðslu av kunnleika um føroyskar bókmentir og av bókmentum um Føroyar. Harumframt veitir Landsbókasavnið vísindabókasavnstænastu. Landsbókasavnið skipar fyri skráseting av føroysku tjóðbókaskránni og er føroysk ISBN, ISMN og ISSN- skrivstova. Á Landsbókasavninum starvast 17 fólk. Sí meira á www.flb.fo.

flb.fo


# KEYP GRÝTUKLÁRAR DUNNUR OG GÆS

**Dunnur uml. 2-3 kg. Gæs uml. 5-6 kg.**
**AVMARKAÐ NØGD.**
**ØYVIND LÜTZEN**
**Tel. 311782 / 211782**



